tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Sjálvberandi búskapur tryggja vælferð

## *Oddagrein*

Í gjár var 1. mai og er hetta dagur arbeiðaranna. Hesin dagurin verður hildin kring allan heim, og eisini her hjá okkum - bert viku eftir flaggdagin verða røður hildnar kring landið. Vit kunnu siga, at hóast Flaggdagurin og 1. mai ikki hava nakað beinleiðis við hvør annan at gera, so er kortini tætt samband millum teir, nú stórur partur av Føroya fólki ynskja størri sjálvræði.

Á flaggdegnum verður mint á tann týdning mál og mentan hava fyri okkara land, og hvussu vit við hesum varðveita og menna okkara samleika og tjóðareyðkenni. Og henda dagin verður eisini stungið út í kortið, hvussu vit í framtíðini kunnu gerast enn meira vitandi um egnan mátt og megi, og hvussu vit taka størri ábyrgd av okkum sjálv.

Arbeiðaradagurin 1. mai skal minna okkum á tann týdning og tey virði, sum arbeiðarafjøldin skapar. Hann skal minna okkum á tey sjálvsøgdu rættindi verkafólkið hevur. Men hann er so eisini vorðin til dagin, tá víst verður á skeiva og órættvísa gongd í samfelagnum. Nú landsstýrið í dag skal undir annað umfarið í samráðingunum um framtíðar støðu Føroya er eisini rætt at vísa á, hvussu stóran týdning tað hevur at kunna varðveita somu rættindi og livikor í framtíðini eisini. Tað kann so ikki koma uppá tal, at tey lægstløntu í samfelagnum skulu spenna lívreimina inn til tess, at vit kunnu fáa meira sjálvstýri, meðan t. d. aðrir bólkar megna at halda fast um síni rættindi.

Broytingar eiga at gerast í okkara ríkisrættarligum viðurskiftum. Vit mugu taka størri ábyrgd av okkum sjálv og hesum samfelag. Tað stendur rimmarfast. Men vit mugu tryggja okkum, at tað ikki verður sjálvstýrið ella fullveldið í sjálvum sær, sum gerst málið. Heldur enn at stríðast um orð og heiti, so skulu vit skipa samfelag okkara soleiðis, at vit veruliga verða før fyri at ráða og stýra okkum sjálvum.

Tað snýr seg um at tryggja grundarlagið undir framtíðar samfelag okkara. Tað snýr seg ikki um at kroysta eina skipan ígjøgnum, sum kanska ein spinkul meiriluti kann taka undir við.

Vilja vit veruliga landinum tað besta, so latið okkum nýta høvi at byggja upp ein sjálvberandi búskap, sum í framtíðini verður grundarlagið undir teirri stjórnarskipan, sum fólkið í Føroyum tá ynskir.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Púra beint Natti

Nú ein dagin visti Sosialurin at siga, at Niels Nattestad, skúlastjóri á Venjingarskúlanum, legði upp til at lata próvtøkuna í fólkaskúlanum fara í ár, og heldur nýta tíðina fram til summarfrítíðina til vanliga skúlagongd.



Hetta eru skila orð frá einum skilagóðum skúlastjóra. Men hetta er ikki bara skilagott í ár.

Vilja vit ein framkomnan fólkaskúla, er ein tann største bágin júst próvtøkan í tí líki, hon enn er í. Hon er ein leivd frá eini farnari tí og í allari síni veru ein andsøgn við andan í teirri lóggávu, vit hava um fólkaskúlan nú á døgum.

Hon er besta einstaka trygdin fyri, at nútíðar arbeiðs- og undirvísingarhættir hava ilt við at vinna frama í gerandisdegnum í skúlanum.

Tað skuldi ikki verið neyðugt at nýtt læntar fjaðrar at prógvføra fyri hesum, tí vitanin um, hvat ið darvar og hvat ið fremur fjøltáttaða undirvísing, er gerandiskostur í undirvísingini á Læraraskúlanum, og hon hevur ið hvussu er verið tað seinastu 25 árini. Eg fari kortini at taka til danska professaran Steen Larsen, sum eitt kvøldið í farnu viku helt fyrilestur í handilsskúlanum í Havn.

Í eini grein í Skúlablaðnum, og seinni í Viðskeranum, tók eg uppaftur eftir hann ein setning, sum hann skemtandi, og eitt sindur argandi, plagar at byrja fyrilestrar sínar við, og serliga tá ið hann veit, at nógvir lærarar eru millum áhoyrararnar.

Hann byrjar ofta soleiðis:

“Vita tit, hví lærarar eru so klókir?” Og hann svarar sjálvur:

“Tað er tí, at teir gera tað arbeiðið sjálvir, sum næmingarnir áttu at gjørt.” Men álvara er sjálvandi aftanfyri, tí her liggur í veruleikanum sjálvt grundarlagið undir allari framkomnari undirvísing.

Einki kemur av sær sjálvum. Tú lærir av tí arbeiði, sum tú leggur í tað. Tí er tað so umráðandi, at børnini í skúlanum fáa høvi at arbeiða og at vera virkin, so tey nøra um sítt forvitni og læra at læra saman við lærarum, sum vita hetta, og sum duga at halda teimum til.

Hetta kvøldið á Handilsskúlanum sótu aðalstjórin í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum og ovasta leiðsla fólkaskúlans.

Hetta, ið vit sótu og hoyrdu, er fremsta vitanin á pedagogiska økinum í okkara tí.

Allar neyðsemjur burtur av hesi leið eru ein leið burtur frá fólksins skúla, tí tá verða lærarar fólkaskúlans alt meira “instruktørar”, ið við ymiskum snildum onkursvegna skulu trútta lærdóm niður í børnini, heldur enn at leiða børnrini at gáttini á teirra egna vísdómi, og tá kunnu vit koma í ta vitleysu støðu, sum summi í álvara halda vera tað einasta rætta: At ungdómar dumpa í fólkaskúlanum.

NB: Meðan eg siti og skrivi hetta, hoyri eg, at verkfallið á fólkaskúlaøkinum er av.

Eg rokni við, at próvtøkuætlan liggur klár til í summar, og skal ikki leggja upp til meira ótryggleika enn tann, sum longu valdar. Varð okkurt gjørt við hetta til næsta skúlaár, so var okkurt gott komið burtur úr søguliga verkfallinum í fólkaskúlanum.

**Pauli Nielsen**
**rektari lærarakúlans**

# Er endamálið at skapa øsing?

Er ætlan landsstýrisins til samráðingarnar 2. mei, at skapa so stóra øsing sum møguligt, fyri á tann hátt at finna eina undarførðslu fyri at inndraga ein altjóða eygleiðara?

Komandi týsdag skal landsstýrið aftur á fund við donsku stjórnina. Fyrri fundurin partana millum (tann 17. mars í ár) gjørdist ein sannur rokfundur, millum annað av tí at landsstýrið ætlaði, at einki skuldi leka út til almenningin. Hvørki føroya fólk, ella umheimurin skuldu fáa nakað at vita um samráðingarnar.

**Landsstýrið ætlaði loynifund**

Landsstýrið ætlaði og kravdi av donsku stjórnini, at hon gekk við til, at einki skuldi leka út. Samráðingarnar skuldu eftir landsstýrisins ætlan enda á Jóansøku, uttan at orð varð grett fyri føroya fólki ella øðrum um, hvussu gongdin undir samráðingunum hevði verið. Alt skuldi haldast dult.

Landsstýrið hevði eisini áðrenn samráðingarnar, við trúnaðarstempling og hóttanum um revsing, roynt at múlabinda bæði andstøðu og uttanlandsnevnd løgtingsins.

Sjálvandi segði danski forsætisráðharrin kortanei til hesa loyniætlan hjá landsstýrinum.

Tað er nevniliga fullkomiliga óhugsandi í einum av fremstu demokratium í heiminum, sum Danmarkar ríki er, at lagna føroya fólks verður avgjørd, uttan at fólkið veit av.

**Landsstýrið breyt siðvenju**

Afturat hesum breyt landsstýrið eisini við alla siðvenju, við at boða øllum 179 fólkatingslimunum til fundar á Christiansborg áðrenn orðaskiftið í Fólkatinginum. Fólkatingslimir sóðu, at etikettin var sum hjá eini bananrepublikk, og tí møttu færri enn 10 fólkatingslimir upp til fundin. Hetta minkaði eisini um føroyska trúðvirði.



Orðaskiftið í Fólkatinginum um samráðingaruppleggið frá donsku stjórnini vísti annars, at stjórnin fekk dygga undirtøku.

**Er endamálið at skapa øsing?**

Komandi týsdag skal landsstýrið aftur á fund við donsku stjórnina. Vit eru mong sum gita um, hvat landsstýrisins ætlan er til henda fundin.

Er ætlanin so sum ábendingar eru um, so skal tann stóra konfliktin skapast, fyri at fáa sett Danmark í so ringt ljós sum møguligt. Hetta skal síðani nýtast sum undarførðsla fyri at biðja um altjóða eygleiðara, at luttaka í samráðingunum.

Er tað veruliga so gali, at landsstýrið at skapa so stóra øsing sum møguligt, fyri at forpesta viðurskiftini ímillum londini?

Livst so spyrst!

**28. apríl 2000**
**Edmund Joensen**

# Drív á Jákup Sverri Kass

Í hesum døgum hava vit verið vitni til, hvussu avbera nógv manglar í, til at føroyingar eru nóg vaksnir til at taka nakað fullveldi. Enn einaferð hava vit sjón fyri søgn, at um ein yngri politikkari roynir at bróta upp úr tí díki, sum tann eldra ortodoksa generatiónin vaðir í, ja so skal hann av øllum alvi dragast niður í sumpin aftur, og helst høvdið undir kav.

J. S. Kass vísir reina og sunna ábyrgdarkenslu, tá hann markerar, at hann vil arbeiða fyri at fáa ein meiriluta í løgtinginum fyri at steðga hesum verkfalli sum nú *hevur vart ein stóran part av einum skúlaári!* Í hesum førinum má ein spyrja, hvat hevur størri prioritet, framtíðin hjá børnunum og harvið eisini framtíð Føroya, ella eitt absurd stríð ímillum eitt fakfelag og fíggjarmálastýrið. Tað stríðið, sum er ímillum hesar partarnar, má loysast upp á onkran annan hátt enn at báðir partar bert blíva við at halda upp á sítt, og so ikki bakka ein tumma. Tað er eisini sjálvsagt, at tá løgtingi viðtekur eina nýggja fólkaskúlalóg, so má løgtingi taka avleiðingarnar av hesum og gjalda tað sum tað kostar. Ella veit høgra hond ikki hvat vinstra ger?

Fíggjarmálaráðharrin uppførir seg ógvuliga undarligt tá hann nærum hóttir J. S. Kass við avleiðingum um hann ger álvara av síni ætlan. Tað er J. S. Kass sum tekur stig til at fáa ein enda á hesum fyri samfelagið sera skammiligu støðu, og um Karsten Hansen ikki hevur nakað betri uppskot til at loysa trupuleikan, ja so kann hann ikki koma við slíkum tápuligum gamlamannasnakki mótvegis Kass sum eftir øllum at døma tekur hetta mál í nógv størri álvara enn nakar annar politikkari.

**Jarðfrøðilesandi**
**Hilmar Simonsen**



